TVØROYRAR KOMMUNA

# Námsfrøðingur til dagrøktina undir Tvøroyrar Kommunu

**Søkt verður eftir:**

• Námsfrøðingi til dagrøktina undir Tvøroyrar Kommunu, at byrja pr. 01 Maj 2008, ella eftir nærri avtalu. Starvið er sett til 25 t / v. Tað krevst, at tú hevur egnan bil. Fyrimunur er, at tú hevur royndir í líknandi arbeiði sum námsfrøðingur.

**Arbeiðsøkið er:**
• Sumba, Tvøroyri, Hvalba. Tað eru 117 børn í skipanini og eru tað í dag 29 dagrøktarar í starvi.

**Vit ynskja, at tú er:**
• Kreativ/ur og ígongdsetandi. Hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og øllum teirra. At tú hevur góð samstarvsevni og eisini kanst arbeiða sjálvstøðugt. Hevur hug til at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.

At seta tín egna dám á dagrøktina og eisini at veita pedagogiskan stuðul til tínar starvsfelagar og dagrøktina sum heild. At veita brúkaranum eina góða og trygga tænastu.

**Kommunan bjóða tær:**
• Eitt áhugavert starv millum góðar og hjálpsamar starvsfelagar. Eitt spennandi arbeiðspláss, har pláss er fyri ymiskleika og har tú kemur at hava ávirkan á dagligdagin.

Tú vilt fáa hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni. Eisini er møguleiki fyri ymiskum skeiðum o.l. innan fyri fakið.

**Setanarviðurskifti:**
• Starvið verður sett eftir sáttmála millum yrkisfelagið - Føroya Pedagogfelag og K.A.F.

Skrivlig umsókn við møguligum avritið av prógvi og viðmælum, verður at senda til niðanfyrinevndu adressu í seinasta lagi 07.04.2008 kl. 12.00

Meira fæst at vita um omanfyrinevnda starv, við at venda sær til Súsannu Poulsen, dagrøktarleiðara, á telefon nr.: 211339.

**Tvøroyrar Kommuna**
Tvørávegur 37
FO – 800 Tvøroyri
Att: Súsanna Poulsen, dagrøktarleiðari.

**Søkt verður eftir fólki til forskallingsarbeiði. Áhugaði kunnu ringja á tlf. 28 03 94.**



# *Lektari og adjunktur í løgfrøði*

***2 størv á Fróðskaparsetrinum***

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt nýtt lektarastarv í løgfrøði og eitt nýtt starv sum adjunktur í løgfrøði leys at søkja.

**Starvsøki**
Umframt at taka sær av undirvísing í grundskeið í lóg skulu bæði lektarin og adjunkturin fyrireika og leggja til rættis eina komandi masterútbúgving í lóg og fremja gransking í lóg. Granskingarparturin hjá lektaranum verður ta fyrstu tíðina tengdur at serøki hansara, men væntað verður, at granskingarøkið verður breiðkað, sum frá líður, og at lektarin rættiliga skjótt skapar møguleika fyri at knýta Ph.D.studentar í løgfrøði at deildini.

Adjunktstarvið er eitt útbúgvingarstarv sett fyri 4 ár, soleiðis at adjunkturin eftir í mesta lagi 4 árum vinnur sær neyðugan granskingar- og undirvísingarførleika og tá kann lektarametast og, um útslitið verður positivt, setast í fast starv sum lektari.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin til lektarastarvið skal umframt kandidatútbúgving í løgfrøði hava granskaraútbúgving í løgfrøði á Ph.D.stigi og hava royndir sum granskari. Lektarin skal hava undirvísingarroyndir og skal duga at samskifta væl á føroyskum, enskum og norðurlendskum. Lektarin skal hava førleika til at knýta netverk og samstarva við onnur universitet.

Adjunkturin skal hava kandidatútbúgving ella samsvarandi í løgfrøði, hava ávísar granskingarroyndir, og um viðkomandi ikki hevur longu hevur ella er komin ávegis við Ph.D.lestri, skal hann ella hon lata seg innskriva til Ph.D.lestur í løgfrøði. Harumframt skal adjunkturin hava somu almennu førleikar sum lektarin.

Til at meta millum umsøkjararnar verður sett ein sakkøn metingarnevnd mannað við trimum fólkum. Av hesum skal eitt fólk hava góðan kunnleika til løgfrøði í Føroyum.

Størvini verða bert sett, um neyðug játtan fæst.

**Umsóknir**
við ævilýsing, próvskjølum, viðmælum ella tilvísingum, vísindaligum greinum, ritgerðum og bókum í trimum eintøkum skula verða Fróðskaparsetrinum í hendi áðrenn 25. apríl 2008. Viðmerkt skal verða, hvat av størvunum søkt verður.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, tel 352583, *elinsj@setur.fo* ella til rektaran Jóan Paula Joensen, tel 352585 ella 552503 *jopajo@setur.fo*

**Umsóknir skulu sendast til:**

Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøtu 14 · Postrúm 272 · FO-110 Tórshavn

Søgu- og samfelagsdeildin heldur til í nýístandsettum húsum í Jónas Broncksgøtu 25 saman við Sjúkrarøktafrøðiskúla Føroya.

Undirvísingarhøli, bókasavn, verkstova og kantina eru felags.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

SENDISTOVAN

Almanna- og Heilsumálaráðið

# Sjúkrarøktarstjóri

Starvið sum sjúkrarøktarstjóri á Landssjúkrahúsinum verður við hesum lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreistin er: 7. apríl 2008, kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið, við at fara inn á heimasíðu okkara: www.ahr.fo, har nágreiniliga lýsingin stendur.

EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

SJÓVAR KOMMUNA

# Søkt verður eftir vaskifólki

til Stranda skúla at byrja 1. juni 2008.

Arbeiðstíðin er 15 tímar um vikuna.

Løn samb. sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Umsóknir skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2008.

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10**
**490 Strendur**